Skjal 5

Kvinnufelagasamskipan Føroya
Postboks 1013
FO-110 Tórshavn
ksf@kvinnufelag.fo
Tlf. 216064

Til:
Manntal
Att: Heini Hátún
Traðagøta 38
Postboks 2092
FO-165 Argjum

Tórshavn, 11. februar 2011

**Hoyringssvar frá Kvinnufelagasamskipan Føroya**

Kvinnufelagasamskipan Føroya takkar fyri høvið at luttaka í hoyringsumfarinum.

Kvinnufelagasamskipan Føroya (KSF) vísir á, at í juni 2010 varð bræv sent nevndini handan Manntal. Í brævinum mótmælti KSF heitið á fólkateljingini, Manntal, og vístu á eventuellu negativu avleiðingarnar av einum navni, ið útilokar gott og væl helvtina av landsins íbúgvum.

Hóast hetta mótmæli, og hóast at tað í hesum brævi vóru fleiri uppskot um onnur kynsneutral heitið til teljingina, so hoyrdist onki aftur um hetta. Vart verður eisini gjørt við, at KS ongantíð fekk svar uppá brævið.

Vit endurtaka sostatt nakað av brævinum dagfest 15. juni 2010:

Heitið

Seinastu mongu árini hava vit, sum arbeiða fyri javnstøðu millum kvinnur og menn, gjørt vart við skeivleikar í føroyska málinum, sum vit halda verða ov dominerað av heitum og orðingum í kallkyni. Eitt nú kunnu vit nevna lýsingarheimin, starvsheiti, lógarverk og tilfar til børn og ung.

Vit vita væl, at tað er eitt stórt tak at broyta føroyska málið, so tað verður kynsneutralt. Men í minsta lagi eiga vit, sum mynda samfelagið í dag, at leggja okkum eftir at nýggj orð og heiti eru kynsneutral. Og ein fólkateljing skal, um nakað, fevna um allar samfelagsbólkar og tískil vera kynsneutral í málburði. Hetta eiga allir almennir myndugleikar at hava í huga, tá farið verður út til borgaran við einum boðskapi.

Vit vita øll, at undirskotið av kvinnum í føroyska samfelagnum er stórt. Spurningurin er, um nøkur vón er um broyting í hesi sera óhepnu samfelagsgongd, tá ið tað almenna framhaldandi brúkar kynsliga eksluderandi orðingar og heiti, sum t.d. Manntal.

Tulkar

Vit duga ikki at síggja ásetingar um løggildar tulkar í lógaruppskotinum. Hetta kann gerast neyðugt tá talan er um íbúgvar, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál og ikki duga at tosa og/ella skilja føroyskt nóg væl til at kunna geva nøktandi svar í kanningini. Talan er um bæði kvinnur og menn, sum kunnu hava brúk fyri tulkum. Tað er týdningarmikið at tulkarnir eru løggildir og á tann hátt hava nøktandi førleikar at tulka til slíka fólkateljing.

Skjal 5

Kvinnufelagasamskipan Føroya
Postboks 1013
FO-110 Tórshavn
ksf@kvinnufelag.fo
Tlf. 216064

Heimleys
Harafturat eru ongar ásetingar um heimleys. Vónandi fer ein komandi kunngerð ella broyting í hesum lógaruppskoti, at taka fyrilit fyri teimum eisini, ið ongan fasta bústað hava.

Eru spurningar viðvíkjandi innihaldinum í hesum brævi, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Vinarliga

Tina K. Jakobsen
Virkandi forkvinna
Kvinnufelagasamskipan Føroya